Nærum óbroyttar rentur og gjaldoyru













Hóast gitingar um rentuhækkingar í Týskalandi hava hildið áfram seinastu vikuna, hevur hetta ikki ávirkað lánsbrøvini í serligan mun. Stuttu lánsbrøvini hava tað framvegis trupult. Stórvegis broytingar hava heldur ikki merkt gjaldoyramarknaðirnar - hóast bretska pundið - GBP - aftur er styrknað nakað.

Seinasta vikan hevur sum heild verið friðarlig á danska lánsbrævamarknaðinum. Vikan hevur verið merkt av somu viðurskiftum sum undanfarna - tvs. gitingum um møguliga rentuhækking í Týskalandi. Hetta hevur lagt eitt fyribils lok yvir møguleikan fyri kurshækkingum, tá talan er um stutt lánsbrøv.

10-ára danska statslánsbrævið kostaði kl. 12 í gjár 105,35 móti 105,15 fyri viku síðan.

Seinastu dagarnar hevur áhugi verið fyri høgtrentaðum realkreditlánsbrøvum, sum seinastu tíðina eru lækkað heilt fitt orsakað av vandanum fyri avdráttum í úrtíð. Tað tykist, sum áhugin merkir, at kursstøðið á hesum lánsbrøvum aftur er hækkandi.

Rentuhækking í Týsklandi spøkir

Umframt ein viknandi DEM, sum í sjálvum sær virkar fyri einum øktum inflationstrýsti, er týska inflatiónin fyri august mánað uppgjørd til 2,0 pst. Mett verður, at um ikki inflatiónin næstu mánaðirnar aftur lækkar, fer týski tjóðbankin - Bundesbank - at hækka rentuna fyri á tann hátt at tálma inflatiónini.

Hesi viðurskifti hava - sum nevnt - ført til, at stuttu lánsbrævarentumar eru hækkaðar lutfalsliga í mun til longu lánsbrævarenturnar. Bundesbank ásetti í gjár repo-rentuna óbroytta næstu 14 dagarnar, og hevði hetta eina ávísa positiva ávirkan á marknaðin.

Mestsum óbroytt gjaldoyru

Hóast áhaldandi gitingar um rentuhækkingar eru ikki stórvegis broytingar hendar á gjaldoyraskinum. Eftir eitt fall úr 11,6852 síðst í juli til 10,2870 fyri viku síðan er bretska pundið GBP aftur hækkað til 11,0920. Amerikanski dollarin - USD - er nærum óbroyttur.

FØROYA BANKI

Peningamarknaðarrentur, DKK (CIBOR)			
	1. sep. 97	*26. aug. 97*	*2. sep. 96*
Diskonto*	3,25%	3,25%	3,25%
1. mánað	3,57%	3,57%	3,74%
3. mánaðir	3,64%	3,65%	3,88%
6. mánaðir	3,84%	3,85%	4,01%

*) Seinast broytt hin 18. april 1996

Gjaldoyra	*2. sep. 97*	*26. aug. 97*	*3. sep. 96*
US dollari	694,25	684,70	573,45
Enskt pund	1108,93	1107,23	898,14
Týskur markur	380,74	380,94	386,17
Norsk króna	92,01	91,37	89,14
Fransk frankur	113,13	113,07	112,82
Japanskur yen	5.7074	5.6025	5.2475

Lánsbrøv	*1. sep. 97*		*25. aug. 97*		*2. sep. 96*	
	Kursur	Eff. renta	Kursur	Eff. renta	Kursur	Eff. renta
7% Føroya Landsl. 1997*	100,70	4,32%	100,74	4,33%	102,10	5,23%
7% Dansk Stat 1998	101,35	3,82%	101,40	3,83%	103,56	4,38%
6% Dansk Stat 2001	110,70	5,10%	110,70	5,10%	107,40	5,28%
7% Dansk Stat 2007	105,33	6,27%	105,23	6,29%	96,26	7,51%

*) Vegna tiltan handi í lánsbrævinum eru kursurin og effektiva rentan 1. sep. 1997 útroknað út frá tilsvarandi donskum lánsbrævum. Av somu orsøk eru talini fyri undanfarnu dagarnar ikki altið eitt haldgott mát fyri veruliga marknaðarkursin tann ávísa dagin.

Vantandi kunning um oljuvinnuna

Vinnan visti einki um tær milliónir krónur, sum vóru at vinnna av í summar, um riðilin av seismikk skipum brúktu føroyska havn. – Vinnan burdi verið betur kunnað, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflog og limur í Oljuráðleggingarnevndini.



GEORG L. PETERSEN

– Eg visti ikki at talan var um so nógv kanningarskip í føroyskum sjógvi í summar. Eg var tó kunnaður um, at fleiri fóru at koma í ár, sigur Magni Arge, limur í Oljuráðleggingarnevndini og stjóri á Atlantsflog.

Samnalgt hava seks kanningarskip verið í føroyskum sjógvi seinastu fýra mánaðirnar. Tað visir seg, at vinnan als ikki var kunnað.

– Vit eru rættiliga tíðliga inni í oljufasuni, og sum er fáa vit eisini væl burtur úr seismisku kanningunum undir Føroyum. Ein av treytunum er, at vit fáa øll tey seismisku úrslitini, sum annars verða seld oljufeløgum, sigur Magni Arge.

– So tað mest týdningarmikla er fingið í hús. Men tað verður lættari at leggja treytir við, tá loyvi skulu gevast til beinleiðis oljuleitingar, sigur Magni Arge.

Hann heldur eina av orsøkunum til at skipini velja aðrar havnir enn tær føroysku, vera av vana og tí greiðiari er við eini umsiting, ein kennir til.

– Men tað er heilt greitt, at tað má vera betur samband millum vinnuna og oljufyrisitingina. Vit áttu eisini at syrgt fyri einum samskifti millum vinnuna og kanningarfeløgini, sigur Magni Arge.

Arbeiðstakarar senda áheitan til seismikkfeløg um at vísa vælvilja

– Tá oljuleitingar byrja, eru krøv sett feløgunum, at virksemið skal ganga um føroyskan kajkant. Hetta átti eisini at verið galdandi nú í kanningartíðini, sigur Jan Mortensen, stjóri í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Felagið fer at kalla vinnufeløg á fund, um áhugi er fyri tí.

GEORG L. PETERSEN

– Vit hava ikki verið vitandi um, at kanningarvirksemið kring Føroyar hevur verið so stórt í summar. Tað er rættiliga óheppið, at hetta ikki hevur verið at merkt í Føroyum, tí skipini hava valt ikki at gera nýtslu av føroyskum tænastum, sigur Jan Mortensen, stjóri í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Tað er longu nú rættiliga fitt av peningi at vinna í sambandi við oljuvinnuna. Hvørja ferð eitt seismikk skip kemur í havn at skifta manning, taka olju og proviant, verða umleið 1,3 milliónir krónur brúktar til føroyskar tænastur.

Og tá talan er um seks skip, sum í meðal koma í havn hvønn mánað eitt fýra mánaða skeið, er talan um nógvar pengar.

Men skipini hava valt Hetland og Skotland, hóast tænasturnar í Føroyum eru kappingarførar, bæði hvat dygd og kostnaði viðvíkur.

Jan Mortensen, stjóri í Føroya Arbeiðsgevarafelag

– Tað hevði ivaleyst loyst seg, um agentar og føroysk feløg við tilknýti til oljuvinnuna settu seg saman at tosa um trupulleikan. Vit kundu so orðað eitt bræv til kanningarfeløgini um hvi tey velja Føroyar frá, vísa á hvat vit kunnu bjóða og at vit ynskja at tey bróka føroyskar havnir, sigur Jan Mortensen, stjóri í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Grundarlag er ikki fyri flúgving til grannarnar

Atlantic Airways fær ikki stuðul til sína flúgving og tískil skal figgjarligt grundarlag vera fyri eini nýggjari rutu. Magni Arge, stjóri, heldur ikki grundarlagið vera í lagi, men viðgongur, at útlit í dag er nógv frægari.

DIA MIDJORD

– Vit fáa ikki stuðul at flúgva, og tískil kunnu vit rokna við at brenna fingrarnar, um rutan ikki gevur yvirskot. Higartil hava vit ikki mett, at figgjarligt grundarlag er fyri flúgving til Noregs og Bretlands, sigur stjórin í Atlantic Airways Magni Arge, sum kortini viðgongur, at útlitini í dag eru frægari enn nakrantið.

Orðini hjá Magna eru í sambandi við, at vinnulívsfólk og oljufólk herfyri settu spurningin, hví Atlantsflog ikki hevur eitthvørt rutusamband við Noreg og Bretland.

Kanska um nøkur ár

Stjórin í Atlantic Airways visir á, at vit eru so fá fólk í landinum, og oljuvinnan er ikki enn komin í nakað fasta rammu.

– Um eini tvey ella trý ár, tá ið oljuvinnan møguliga er komin í fastar karmar, kann grundarlag verða fyri onkrum sambandi til nærmastu grannarnar. Eg vildi við, at tað er lættari at fáa í lag regluligt samband við Bretland enn Noreg.

Magni Arge heldur tað vera sannlikt, at Noreg og Bretland gerast ein partur av einum framtíðar rutumynstri úr Føroyum.

– Keypmannahavn, Ísland, Noreg og Bretland kundi eg hugsað mær vóru í okkara flúgvætlan nøkur ár fram í tíðina. Keypmannahavn, um ein skal til Europa og eystureftir. Ísland, um ein ætlar sær vestureftir, og síðan samband við nærmastu grannarnar Noreg og Bretland, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways.

Magni Arge: – Vit meta ikki grundarlag vera í dag at hava rutusamband við Noreg og Bretland, men útlitini eru tey frægastu í langa tíð

Síðsti aðalstjórin settur

Petur Alberg Lamhauge var í gjár settur í starv sum figgjarmálastjóri, sum tann síðsti av teimum fimm aðalstjórunum í landsumsitingini. Royndir hansara eru bæði drúgvar og fjøltáttaðar.

INGI RASMUSSEN

Av teimum trimum umsøkjarunum, sum søktu starvið sum figgjarmálastjóri, metti Anfinn Kallsberg, figgjarmálaráðharri, forstjóran á Toll- og skattstovu Føroya at verða tann best skikkaða.

Hetta er tað síðsta aðalstjórastarvið av teimum fimm í aðalstýrunum, sum eru eitt úrslit av nýggju styrisskipanarlógini. Hinir, sum longu eru farnir til verka, eru Petur Petersen, undirvisingar- og mentamálastjóri, Arni Poulsen, vinnumálastjóri, Høgni Joensen, almanna- og heilsustjóri og Kjartan Hoydal, veiðumálastjóri.

Fjøltáttaðar royndir

Petur Alberg Lamhauge er 48 ára gamal og er útbúgvin cand.merc. Royndirnar eru bæði drúgvar og fjøltáttaðar.

Síðstu árini á Toll- og skattstovuni, har hann hevur verið forstjóri í 5 ár, er orkan serliga farin til at leggja Tollstovuna saman við Líkningarráðnum. Hann hevur eisini havt ábyrgdina av at seta mvg-skipanina í verk.

Annars arbeiddi Petur Alberg Lamhauge fyrsta árið eftir lokna útbugving sum grannskoðari í Keypmannahavn hjá grannskoðaravirkinum C. Jespersen.

Tá hann kom heimaftur til Føroya, var hann fyrst grannskoðari hjá Carl Wilhelm Weihe í sjey ár. Aftaná bert eitt ár sum skrivstovustjóri hjá SEV, gjørdist hann stjóri á Líkningarráð Føroya, har hann starvaðist í onnur sjey ár.

Petur Alberg hevur umframt hesi havt fleiri álitisstørv. M.a. var hann formaður í arbeiðsbólkinum, sum gjørdi uppskot til arbeiðsloysisskipanina, og limur í nevndini, sum gjørdi uppskotið til nýggja vinnulívsløggávu.

Petur Alberg Lamhauge, nýggjur figgjarmálastjóri